## TIL ARBEIÐIS

**LAGT TIL RÆTTIS:** Vilmund Jacobsen, vilmund@sosialurin.fo



**FAKTA:**

**Navn:** Sigrún Halldórsdóttir Brend
**Starv:** Vertur í Degi og Viku
**Besta við starvinum:** Mær dámar at vera mitt í meldrinum
**Ringasta við starvinum:** Stríggið, tá runnið verður um kapp við deadline
**Stjóri:** Annika Mittún Jacobsen

*Sigrún Halldórsdóttir Brend hevur ongantíð verið bangin fyri at arbeitt. Hon hevur tikist við nógv ymiskt, og miðskeiðis í nítiárunum byrjaði hon at arbeiða á Degi og Viku*

**MYND:** ÁLVUR HARALDSEN

# Sigrún trívist í eldinum

– MÆR **DÁMAR** STAK VÆL AT ARBEIÐA Á **DEGI OG VIKU**, OG MÆR DÁMAR **VÆL** AT VERA MITT Í **MELDRINUM**, HAR ALT **HENDIR**. AT HAVA **DEADLINE** OG AT ARBEIÐA UNDIR **TRÝSTI** DÁMAR MÆR **EISINI** VÆL, TÓ AT TAÐ **MANGAN** ER **STRÍGGIÐ**. VIT KEMPA OG **STRÍÐAST** FYRI AT FÁA TAÐ **BESTA** Á **SKÍGGJAN**, SIGUR **SIGRÚN HALLDÓRSDÓTTIR BREND**

Hon er millum kendastu andlit í sjónvarpinum hjá Kringvarpi Føroya, tá ræður um tíðindasendingar. At lesa dugir hon væl. Hon tykist avslappað, men dugir at gera tíðindi livandi og knýtir hyggjarar til skíggjan við síni týðiligu og kláru rødd.

– Eg byrjaði í Sjónvarpi Føroya í 1991, har eg tekstaði danskar teknifilmar til føroyskt. Seinni hjálpti eg Biritu Weihe og Anniku Marr Poulsen við at gera Barnaløtuna. Uppaftur seinni kom sendingin við JussuFastir á skránna, sigur Sigrún Halldórsdóttir Brend.

### Tíðindi hvønn dag

Tað var miðskeiðis í nítiárunum, at hon byrjaði á Degi og Viku.

– Í byrjanini var tað ein dag um vikuna, har eg skrivaði uttanlandstíðini. Nú arbeiði eg fulla tíð á Degi og Viku, og tað dámar mær stak væl. Mær dámar at vera mitt í meldrinum, har alt hendir. At arbeiða undir trýsti og at hava deadline hvønn einasta dag dámar mær, hóast tað mangan er stríggið.

Sigrún veit, at einki verður gjørt til lítar, um fólk ikki standa saman um at fáa tað besta burtur úr.

– Tí er tað frálíkt at kenna felagsandan á redaktiónini, tá okkurt óvæntað er á vási. Vit kempa og stríðast fyri at fáa bara tað besta á skíggjan. Sum hyggjarin helst eisini sær, hava vit aloftast okkara egna vinkul upp á søgurnar. Tað er nakað, sum vit leggja dent á, sigur hon.

Kendi verturin í Degi og Viku sigur seg gleðast til tann dag, tá sjónvarpið fer hava tíðindasending hvønn einasta dag í viku.

– Vit liva í 2011, og sjálvandi eiga føroyingar at kunna síggja føroysk tíðindi hvønn dag. Eg bíði í spenningi eftir hesum degi, leggur Sigrún Halldórsdóttir Brend aftrat.

### Hvør er hon?

– Eri fødd í Reykjavík. Tríggjar mánaðar gomul fluttu vit heim til Føroya at búgva. Eri uppvaksin mitt í býnum í Havn – í Kongagøtu 3. Húsini eru tikin niður, og har er nú parkeringspláss. Tá eg fór í skúla, fluttu vit út á Peter Head í vesturbýnum at búgva. Eg gekk í Venjingarskúlanum, men tók 10. flokk í Danmark.

Foreldrini hjá Sigrún eru Halldór og Alma. Systkini eru Snorri, sum er elstur og býr í Hoyvík. Yngru systkin eru Bjørg og Jóhann, sum bæði búgva í Keypmannahavn.

Hon tók HF-prógv í Hoydølum í 1981, pedagogprógv í Vanløse í Danmark í 1985 og læraraprógv á Føroya Læraraskúla í 1991.

– Í løtuni taki eg ein part av journalistútbúgvingini umvegis Danmarks Journalisthøjskole í Århus, sigur hon.

### Roynt ymiskt

Hvat gjørdi Sigrún í sínum uppvøkstri, og meðan hon enn var ungdómur?

– Eg havi ongantíð verið bangin fyri at arbeiða. Longu sum 12-13 ára gomul arbeiddi eg í summarfrítíðini á Bacalao. Eg legði skrubbur upp á plattar úti í ísakalda kjallaranum. Skrubburnar skuldu frystast og sendast av landinum. Sólfinn Simonsen var arbeiðsformaður í kjallaranum tá. Har arbeiddi eg tvey summur.

Nógvar ungar gentur hava eisini arbeitt í grillbarr, og tað hevur Sigrún eisini.

– Eg arbeiddi fyrst í grillbarrini hjá Crazy í Niels Finsensgøtu og seinni í pylsuvogninum hjá Emely. Brúni vognurin stendur enn tann dag í dag á eystaru bryggju. Eg arbeiddi eisini í kioskini hjá Alith Lamhauge á Vaglinum.

Eitt skifti sum eini 16 ára gomul arbeiddi Sigrún í eitt ár sum servitrisa á Hotel Hafnia.

– Eftir hetta fór eg til Íslands og arbeiddi í nakrar mánaðir í fyritøkuni hjá fastur míni, sum útflutti íslendskar ullavørur til USA, Avstralia, Eysturríki og Týsklands. Fyritøkan kallaðist Hilda h/f, og er ikki til í dag, sigur hon.

### Gongsgenta

Áðrenn Sigrún fór á læraraskúla í Føroyum, og meðan hon las til pedagog í Danmark, arbeiddi hon í vikuskiftum sum gongsgenta á Hotel Hebron, og seinni sum gongsgenta á SAS Radisson á Amager og SAS Hotel Royal.

Sum eitt lítið ískoyti til tíðina í Danmark, vísir hon á, at tað kom væl við hjá henni, at Føroyafrádrátturin tá var 40.000 krónur.

– Meðan eg gekk á Føroya Læraraskúla, arbeiddi eg sum pedagogur á Eirargarði 16 A og 14 A – og forrestin arbeiddi eg eisini tvey ár í Útvarpinum árini 1987 til 1989, sigur kenda røddin í Degi og Viku, Sigrún Halldórsdóttir Brend.